Landsfundur Sambandsfloksins 1996
verður fríggjadagin 26. og leygardagin 27. apríl í Havn

Fundurin byrjar **fríggjakvøldið kl. 17 í Norðurlandahúsinum** og fer fram eftir viðtøkum landsfelagsins.

Leygarmorgunin kl. 10 heldur fundurin fram úti í **Læraraskúlahøllini**, har byrjað verður við, at Edmund Joensen, formaður Sambandsfloksins leggur upp til politiskt orðaskifti. Skráin verður lýst seinni

Um kvøldið verður veitsla í Havnar Klubba.

Tekning til veitsluna hjá formonnunum í lokalfeløgunum og á tlf. 18870/fax 18910. Kostnaður fyri hvønn 150 kr.

Landsnevndin

Oljunevnd: Hugsið fyrst um longru útbúgvingarnar

Útbúgvingarnevndin innan oljuvinnu sigur, at tvinnir eru vegirnir, tá tað snýr seg um útbúgvingar innan oljuvinnu – antin fáast avtalur í lag við útbúgvingarstovnar uttanlands, ella verða útbúgvingarnar settar á stovn í Føroyum.

NICLAS JOHANNESEN

»Tá útbúgvingarætlanir verða gjørdar, eigur at verða hugsað um, hvørt næmingar skulu sendast uttanlands at taka partar av ella fullar útbúgvingar, ella um tað betur loysir seg at seta á stovn útbúgvingar á føroyskum útbúgvingarstovnum.«

Hesi eru orðini til landsstýrismannin í skúlamálum Eilif Samuelsen frá útbúgvingarnevndini innan oljuvinnu. Nevndin er júst komin við skrivligari frágreiðing, har møgulig føroysk oljuvinna og skúlamál verða tvinnað saman.

Nú fer landsskúlafyrisitingin møguliga at umsita oljuútbúgvingar

Grundútbúgvingar

Nevndin sigur, at tørvur kann væntast at verða á fólki við so at siga øllum útbúgvingum. Men lagdur verður eisini dentur á, tørvurin skiftir alt eftir hvørjum støði øljuvinnan er á. Prátað verður um trý høvuðsskeið; eitt kanningar-/leitingarskeið, eitt útbúgvingarskeið og eitt framleiðsluskeið.

Í sama andadrátti sigur nevndin tó, at fyrst eigur at verða hugsað um tær longru útbúgvingarnar, sum krevja fleiri ára lestur og starvsroyndir.

Nevndin staðfestir, at tøknifrøðiliga menningin innan oljuvinnuna hevur við sær, at tørvurin á menniskjaligari arbeiðsmegi minkar.

»Bæði tey sonevndu konktraktorfeløgini og oljufeløgini spyrja í størri mun eftir fleirtáttaðari arbeiðsmegi, t.e. fólk við breiðum útbúgvingum/royndum, soleiðis at til ber at nýta sama fólki til fleiri funktiónir. Tí er umráðandi at hava góðar grundútbúgvingar, ið eru skjótar at dagføra, og sum gera fólk før fyri skjótt at læra nýtt«, skrivar nevndin.

Nøgdur

Eilif Samuelsen segði á tíðindafundi í landsstýrinum týsdagin, at hann metir, føroyingar eru væl fyri, tá tað snýr seg um grundútbúgvingarnar, so sum studentaskúlum, handilsskúlum, tekniskum skúlum o.s.fr. Støðið er høgt, segði hann.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað kann eisini koma upp á tal at seta serútbúgvingar á stovn í Føroyum við atliti til oljuvinnuna.

Eilif Samuelsen staðfesti eisini, at longu nú eru tað fleiri føroyingar sum lesa uttanlands til eitt nú oljuverkfrøðing. So tá tað snýr seg um longru útbúgvingarnar, standa føroyingar ikki heilt á berum.

Og tá tað snýr seg um stytru útbúgvingarnar og skeiðvirksemi, ella umskúling, so útihýsir landsstýrismaðurin ikki møguleikanum fyri, at hesin parturin kemur undir føroyskt skúlaverk.

Eilif Samuelsen, landsstýrismaður

»Marran hjá Tyson« fram fyri almenningin týsdagin

Á stórum tíðindafundi týsdagin greiddu sakførararnir hjá LaDonna August frá, hvussu Mike Tyson hevði verið ónæriligur móti henni annað páskakvøld í einum náttklubba í Chicago. Men enn er eingin ákæra reist móti WBA-heimsmeistaranum í tungvektsboksing.

HILMAR JAN HANSEN

(REUTER) Eftir at hava verið dulnevnd í eina viku, steig 25 ára gamla LaDonna August týsdagin umsíður fram fyri almenningin, tá hon og sakførarar hennara høvdu tíðindafund í býnum Gary í statinum Indiana.

Tað er LaDonna August, ið hevur skuldsett WBC-heimsmeistaran í tungvektsboksing, Mike Tyson, fyri at hava verið ónæriligur móti sær í einum náttklubba í Chicago fyri góðari viku síðani – annað páskakvøld.

Hon er leiðari av einari vakurleikasalong í Gary. Hon og átta ára gamla dóttir hennara búgva í einum Gary-forstaði, Miller, saman við núverandi drongi hennara, Jay Evans. Men síðani tilburðin hevur hon havt duldan bústað.

Ein rúgva av myndamonnum vóru til staðar á tíðindafundinum, har hon hevði tríggjar av fýra sakførarum sínum rundan um seg – umframt tveir vaktarmenn. Allan tíðindafundin sat hon á einum klappstóli við einum av vaktarmonnunum tætt hjá sær, meðan sakførarnir søgdu seg hava sannprógv fyri, at Tyson »hevði kínt henni«.

Tyson enn einki sagt

Mike Tyson hevur enn ikki alment svarað skuldsetingunum frá LaDonna August aftur. Í 1992 bleiv hann dømdur fyri at hava neyðtikið eina vakurleikadrotning, men hevur alla tíðina noktað seg sekan. Hann slapp úr fongslinum fyri einum ári síðani, og er í løtuni royndarleyslatin.

Sakførari hansara, Robert Hirth, segði í einum tíðindaskrivi týsdagin, at Mike Tyson heldur enn gjarna vil hava nágreiniligar løgreglukanningar settar í verk av skuldsetingunum, og at hann kennir seg vísan í, at slíkar kanningar skjótt høvdu víst, at hann er púra ósekur og at skuldsetingarnar eru falskar.

Charles Graddick, ein av sakførarunum hjá LaDonna August, segði á tíðindafundinum, at hon tíðliga annað páskakvøld bleiv lokkað inn í eitt avsíðis privathøli í náttklubbanum, eftir at henni vóru givin boð um, at hon skuldi finna fram yvirfrakkan.

LaDonna August á tíðindafundinum týsdagin, har tríggir av hennara fýra sakførarum vóru til staðar. Tað er hon, ið hevur skuldsett Mike Tyson fyri at hava verið ónæriligan móti sær í einum náttklubba í Chicago annað páskakvøld *Mynd: Scott Olson/REUTER*

Fekk súgvimerki

Síðani segði sakførari hennara, at Tyson beinanvegin var lagstur á hana og »á ósømiligan hátt hevði nortið við hana og kínt henni, fyri at enda at geva henni eitt súgvimerki á hennara vinstra kjálka«.

Ikki kundi sakførarin tó gera greitt, um hon var einsamøll við Tyson hesa løtuna, ella um onnur eisini vóru til staðar í hølinum. Kortini segði Graddick, at »hennara frásøgn frá tilburðinum var blivin staðfest... av øðrum.«

Hann vildi ikki greiða nærri frá smálutum í málinum.

Víðari greiddi Charles Graddick frá, at tíðin skuldi nokk koma, tá LaDonna August sjálv fór at greiða frá tilburðinum og svara øllum spurningum um tað, ið var farið fram.

Men samstundis segði hann, at eingin avgerð var tikin um at leggja sak móti Mike Tyson. Hann avsannaði eisini, at nakrar samráðingar ella annað samskifti hevði verið millum sakførararnar hjá LaDonna August og teir hjá Mike Tyson.

Legði ikki sjálv upp til nakað sum helst

Sakførarin vísti á, at LaDonna August ikki var í á nakran hátt øsandi ella eggjandi klæðum í náttklubbanum, og at hann einki kendi til, at hon skuldi havt biðið um at møtt Tyson fyrr um kvøldið, sum ført hevur verið fram.

Hann segði, at hon ikki upp á nakran hátt sjálv legði upp til nakað.

LaDonna August var av sakføraranum lýst sum týðiliga skelkað av tilburðinum, men at hon kortini hevur tamarhald á støðuni.

Eftir náttklubbavitjanina fingu vinkonurnar hana fyrst til hús, men fáar tímar seinni var hon farin á eitt sjúkrahús fyri at vera kannað.



Mike Tyson hevur enn ikki sjálvur gjørt nakrar viðmerkingar til hendingina í einum Chicago-náttklubba annað páskakvøld, men sum skilst vil hann heldur enn fegin hava løgregluna at kanna alt út í æsir, so hann kann bliva reinsaður fyri álvarsligu skuldsetingarnar *Savnsmynd: REUTER*

Tyson nógv broyttur

Meðan Mike Tyson sat í fongsli í Indiana, skifti hann yvir til islamisku trúnna, og hann nertir ikki rúsandi løg longur. Stutt sagt livir hann eitt heilt annað lív nú, enn hann gjørdi frammanundan – hann er blivin pápi og skal helst eisini giftast seinni í summar við gentu síni, ið hann hevur fingið barn saman við.

Vinir hjá Tyson hava eisini ført fram, at hann ongantíð var í nøkrum avsíðis høli, har hann kundi vera einsamallur saman við nøkrum. Av tí at nógv fólk var til staðar í náttklubbanum, vóru alla somlu tíðina fólk rundan um hann, tí neyðugt var at hugsa um hansara trygd – alla tíðina.

Av tí at Tyson bert er royndarleyslatin, er hann biðin um at halda seg heima við hús í Southfield í Ohio, meðan málið verður kannað, og hesum hevur hann eftirlíkað. Vísir tað seg, at hann bert hevur gjørt tað allarminsta, noyðist hann í ringasta føri aftur inn um rimarnar at sita.

Tá hann í fjør slapp úr fongslinum, hevði hann sónað trý av teimum seks árunum, hann hevði fingið sum dóm. Og tað var fyri góðan atburð, at hann slapp leysur.

Ivast um trúvirði hjá LaDonna August

Fleiri ivast tó í, um hann hevur so øgiliga nógv at vera bangin fyri, tí vinkonur hjá LaDonna August hava sagt, at søgan bert er íspunnin, og at hon kann finna uppá at gera alt fyri pengar. Við øðrum orðum er stórur ivi um trúvirði hennara.

Vinkonurnar hava greitt frá, at einki sást á henni, eftir at hon hevði heilsað upp á Tyson, og at hon dansaði og stuttleikaði sær fleiri tímar aftaná, at »skelkandi hendingin« skuldi vera farin fram.

Ein vinkona – hon má vælsaktans nú vera fyrrverandi – hevur sagt, at finst nøkur gívur, er LaDonna August ein sovorðin, tí hon fer við mannfólki, sum henni lystir.

Eisini hevur fyrrverandi verfaðir hennara, Melvin August Sr., greitt frá, at hon helt saman við syni teirra, tí hann hevði fingið stóra upphædd frá tryggingini eftir eina vanlukku, men at hon rýmdi frá honum, so skjótt sum pengarnir vóru uppi. Hann leggur aftrat, at tað enntá var hon, ið brúkti pengarnar.

Um tað bert er pengar, LaDonna August hugsar um í hesum føri, kann ikki sigast annað, enn at hon er farin á eitt av bestu miðunum. Tyson tjenar fleiri milliónir um minuttin, tá hann boksar...